# SUNLEIF RASMUSSEN Í FRAKLANDI

**Sunleif Rasmussen var herfyri í Fraklandi, har hann var eitt av høvuðsnøvnunum á stórari tónleikastevnu í París. Har framførdi hann nøkur av verkum sínum. Millum annað varð nýggja verk hansara, La nuit des Eplorés, frumframført. Í hesum sambandi hava vit tosað við Sunleif**



Fyri hálvum øðrum ári síðani var Sunleif biðin um at skriva eitt verk til eina av árligu tónleikastevnunum í París. Stevnurnar hava verið í fjúrtan ár, og eru tær av teimum størstu í Evropa innan fyri nútímans klassiskan tónleik við symfoniskum ljóðførum.

Umbiðingin kom frá Radio France, sum skipar fyri hesum stevnunum. Uppgávan hjá honum var bundin. Hon skuldi skrivast til symfoniorkestur og barnakór. Verk hansara skuldi vera opningsverkið á stevnuni. Hvørt ár er eitt høvuðsevni á stevnuni, og hetta árið var evnið Tónleikur úr Norðurlondum. Allar konsertirnar vóru fullsettar. Salirnir rúmaðu 2500 til 3000 fólk. Sera nógv ung fólk møttu upp til konsertirnar.

Tá stevnurnar vórðu stovnaðar, var avgjørt at geva tveir triðingar av atgongumerkjunum ókeypis. Einans tey bestu setrini skuldu seljast fyri lítlan pening. Uml. 75,00 kr. til 150,00 kr. Hetta fyri at fáa so nógv fólk inn sum til bar. Røðirnar vóru ómetaliga langar, og fólk stóðu í bíðirøð við bók í hond í fleiri tímar fyri at fáa atgongumerki. Atvoldin til hesir lágu prísirnar var, at atgongumerkisinntøkan í roynd og veru einans er eini 15% av fíggjarætlanini. Við at lata atgongumerkini so bíliga ella ókeypis, sleppa tey næstan undan at lýsa, sum er ein stórur partur av fíggjarætlanini. Fólk eru jú altíð áhugað í at sleppa til okkurt ókeypis tiltak.

Tá vit spurdu Sunleif, hvat hann helt seg hava fingið burturúr, segði hann seg hava fingið nógv aftursvør. Bløðini skrivaðu um stevnuna, og kjak varð eftir hvørja konsert. Tíggju lond útvarpaðu stevnuna beinleiðis, meðan tjúgu onnur høvdu keypt rættindini til at senda hana. Hetta vil siga, at tónleikur hansara verður sera nógv útbreiddur. Sunleif fekk eisini burturúr, at tvey fronsk orkestur keyptu rættindini at framføra nýggja verkið, La nuit des Eplorés. Eitt teirra var franska radiosymfoniorkestrið.

Ein av orsøkunum til, at Radio France, so at siga, kann hava eina ókeypis stevnu fyri áhoyrarar, er, at Frakland hevur størstu mentanarfíggjarætlan í heiminum. Frakland veitir næstan 4% av bruttotjóðarúrtøkuni til mentan og list. Til samanberingar kann sigast, at Danmark brúkar umleið 2% av BTÚ til mentan og list. Almenni hugburðurin er tann, at fólkið, og serliga tey ungu, skulu hava bestu møguleikarnar fyri at hoyra, síggja og lesa nútímans list. Málið er at kveikja áhugan hjá fólkinum fyri nútímans list. Eisini kann nevnast, at Frakland hevur tríggjar landsumfatandi sjónvarpsrásir, har stórur partur av tilfarinum er kjak um bøkur, stjørnufrøði, tónleik og list. Frakland stuðlar alment tí, sum veruliga hevur dýpi og virði. Samanumtikið heldur Sunleif, at tann franski hugburðurin, í samband við list, er tann sunnasti, sum hann hevur upplivað.

Eftir at Sunleif fekk Tónlistaheiðursløn Norðurlandaráðsins, hevur eftirspurningurin eftir verkum hansara verið stórur. Í løtuni er hann í holt við at skriva eina violinkonsert, sum er bíløgd til ein festival, sum verður í Finnlandi í summar, har hann skal vera høvuðsnavn. Annars hevur hann umbiðingar heili 3 ár fram í tíðina.





TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN
MARKNAGILSVEGUR 75 · POSTBOKS 239 · 110 TÓRSHAVN
TEL 311957 · FAX 316621 · TST@TST.FO · WWW.TST.FO



JUNIIK
Vágsbotnur · Tórshavn · Tel 321300





P/f Inni · Meklarafelag · N. Finsensgøta 37 · Tórshavn · Tel 320410 · www.inni.fo

Serkøn í húsasølu




Við serkønum fólkum skipar Inni fyri og umsitir keyp og sølu av sethúsum og øðrum ognum kring allar Føroyar, soleiðis at tað verður léttari og tryggari hjá bæði keypara og seljara.

Inni – trygt og ómakaleyst til hús




KVIK KEYP
TEL. 32 20 06

HALDIÐ SOSIALIN

400,- um ársfjórðingin
- sparið 380,-
í mun til leysasølu




Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ____
Bústaður: ____
Postnr.: ____
Bygd/býur: ____
Telefon nr.: ____
Undirskrift: ____

**Ókeypis**
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

**64**

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Sosialurin
ARGJAVEGUR 26 · POSTSMOGA 76 · 110-TÓRSHAVN · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO